## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Seinnapartin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og um kvøldið regn. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av landsynningi og regn, seinnapartin hækkar hann upp í landnyrðing og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið frískar hann vindin av suðri og landsynningi og sum frálíður regn. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í andøvsgul av suðri og útsynningi og regn eitt skifti. Týsdagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Nú eru bungurnar komnar



*- Vit eiga at handla beinanvegin, tá eitt slíkt óhapp, sum hendi við Café Nátúr mánanáttina, hendir, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn. Mikukvøldið vóru vegbungur gjørdar við Café Nátúr - sum beinleiðis úrslit av óhappinum mánanáttina*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Men frá Tórshavnar Býráð hava nú gjørt tvær vegbungur við Café Nátúr í Havn til tess at avmarka skilaleysu koyringina.**

**Tvær aðra bungur vórðu eisini gjørdar í Havn í hóskvøldið**

FERÐSLUTRYGD
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin*

- Eg havi næstan ongantíð fingið so nógvar uppringingar og teldupostar, ið øll sum ein tóku undir við at her skuldi nakað gerast, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri, eftir at hann saman við umsitingini og løgregluni hevur gjørt av at gera nakrar vegbungur í miðbýnum í Havn.

Beinleiðis orsøkin til hetta stig býráðsins var ferðsluóhappið mánanáttina, sum stóðst av sera skilaleysari koyring.

Heðin Mortensen hevur frætt bæði frá koyrilærarafelag, frá Ferðslutrygd og frá nógvum øðrum fólkum við, sum øll hava tikið væl undir við hesum, sigur hann.

Sjúrður Olsen, limur í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar býráð segði annars við útvarpið í mikukvøldið, at hann skilti ikki, hví hetta málið var skundað ígjøgnum - og at bungurnar í hesum føri vóru nyttuleysar.

Men hesum er borgarstjórin als ikki samdur í.

- Vit eiga at handla beinanvegin, tá eitt slíkt óhapp hendir. Eg vil so ikki standa við ábyrgdini, tá vanlukkan er hend, og fólk kunnu briksla býráðnum, at einki varð gjørt. Tí varð handlað beinanvegin, sigur Heðin Mortensen, sum leggur afturat, at hetta bert var fysta stigið í eini ætlan at gera býin ferslutryggari at ferðast í.

Tvær aðrar bungur vórði eisini gjørdar í Havn í mikukvøldið. Onnur við vøggustovuna hjá Nunnunum í Varðagøtu og hin við skrivstovubygningin hjá Rasmussen & Weihe á Hoyvíksvegnum.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 12 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 22 |
| Tromsø | 15 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 29 |
| Malta | 27 |
| Tunis | 36 |
| Beijing | -- |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 12 |
| New York | 31 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1009 hPa. við Ísland grynnist. Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. við Hvarvið fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/8 kl. 06[00]– 11/8. 06[00]. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,2 mm – mált frá 10/8 kl. 06[00]– 11/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 23,9 mm

**ÚF**

## Morgunlestrar
**15.-20. august**

***Heri Joensen, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 15. august:**
nr. 3 Harranum lovi
nr. 20 Øll vit við gleði halleluja kvøða

**Týsdagin 16. august:**
nr. 29 Alt, sum frítt og fagurt er
nr. 558 Faðir, fylg mær henda dag

**Mikudagin 17. august:**
nr. 553 Náttin myrka horvin er
nr. 232 Kom, andi Guðs

**Hósdagin 18. august:**
nr. 398 Miskunsami, mildi faðir

**Fríggjadagin 19. august:**
nr. 515 Guðs náði altíð er mær hjá
nr. 405 Lat, o, Guð, tín einglaskara

**Leygardagin 20. august:**
nr. 329 Jesus góði, saman her
nr. 393 Guð faðir meg vara

## VESTFALLSKYRRINDI

4. august – Mánin longst frá jørðini
5. august – Tendring
13. august – Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12. aug | - | 12.14 | 11.14 | 23.36 | 11.29 | 23.51 | 01.53 | 14.14 | 02.53 | 15.14 | 10.29 | 22.51 | 09.29 | 21.51 | 00.08 | 12.29 | 01.08 | 13.29 | 11.59 | - | 00.53 | 13.14 |
| 13. aug | 00.36 | 13.12 | - | 12.12 | - | 12.27 | 02.36 | 15.12 | 03.36 | 16.12 | 11.27 | - | 10.27 | 23.04 | 00.51 | 13.27 | 01.51 | 14.27 | 00.21 | 12.57 | 01.36 | 14.12 |
| 14. aug | 01.49 | 14.29 | 00.49 | 13.29 | 01.04 | 13.44 | 03.49 | 16.29 | 04.49 | 17.29 | 00.04 | 12.44 | 11.44 | - | 02.04 | 14.44 | 03.04 | 15.44 | 01.34 | 14.14 | 02.49 | 15.29 |
| 15. aug | 03.10 | 15.39 | 02.10 | 14.39 | 02.25 | 14.54 | 05.10 | 17.39 | 06.10 | 18.39 | 01.25 | 13.54 | 00.25 | 12.54 | 03.25 | 15.54 | 04.25 | 16.54 | 02.55 | 15.24 | 04.10 | 16.39 |
| 16 | 04.08 | 16.37 | 03.08 | 15.37 | 03.23 | 15.52 | 06.08 | 18.37 | 07.08 | 19.37 | 02.23 | 14.52 | 01.23 | 13.52 | 04.23 | 16.52 | 05.23 | 17.52 | 03.53 | 16.22 | 05.08 | 17.37 |

5 707265 100050 >